

# Turrir brunnar og West Hercules í Vinnuhúsinum

**Jan Müller**

16.03.2015 - 16:35

Oljan.fo

Turrir brunnar, lægri prísir og West Hercules á Skálafjørðinum – hvat merkir hetta fyri føroyska oljuvinnu?er heiti á limafundi í Oljuvinnufelagnum mikudagin.

**Mikudagin 18. mars kl. 15.00 - 17.00 bjóðar Oljuvinnufelagið til limafund í Vinnuhúsinum, har evnið er:***Turrir brunnar, lægri prísir og West Hercules á Skálafjørðinum – hvat merkir hetta fyri føroyska oljuvinnu?***Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum, Mourtiz Mohr, stjori í MEST, Gunnbjørn Joensen, stjóri í Thor og Tórbjørn Jacobsen, havnarmeistari í Runavíkar havn fara at hugleiða um hetta evni og høvi verður at seta spurningar. Á fundinum greiða vit eisini frá luttøkuni á Offshore Europe í Aberdeen í september og umrøða hvussu hon kan brúkast at skapa áhuga fyri Føroyum sum virknum parti av frálandavinnuni millum Skotland og Føroyar. Vinarliga boða frá luttøku hjá samskiparanum Jórun Gardar á teldupostijorun@industry.foí seinasta lagi týsdagin 17. mars á middegi.**

(Sí samrøðu við formannin í Oljuvinnufelagnum, Magna Arge í grein seinni í dag.)